# Óbroyttur sáttmáli millum Føroyar og Ísland

FISKIVEIÐIAVTALA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Føroyar og Ísland hava undirskrivað sínámillum fiskiveiðiavtalu fyri 2005. Sáttmálin millum londini er at kalla hin sami, sum tann, ið nú er farin úr gildi.

Jens Hegi Toftum, sum starvast í Fiskimálaráðnum, sigur, at føroyingar eftir nýggja sáttmálanum kunnu fiska 5.600 tons av botnfiski í íslendskum sjógvi, harav í mesta lagi 1.200 tons av toski. Aftrat hesum hava føroyingar eina kalvakvotu undir Íslandi, sum er 80 tons.

Føroyingar kunnu eisini fiska 30.000 tons av lodnu í íslendskum sjógvi í vertíðini, 2005/2006, og somuleiðis kunnu vit fiska 10.000 tons av lodnuni, sum vit hava í sáttmálanum við Grønland, í íslendskum sjógvi.

Jens Helgi Toftum sigur, at sambært sáttmálanum kunnu føroysk og íslendsk skip fiska norðhavssild og svartkjaft hjá hvørjum øðrum.

Íslendsk skip kunnu fiska 2.000 tons av hetlandssild í føroyskum sjógvi og 1.300 tons av makreli.



*Umboðini úr Fiskimálaráðnum, sum hava samráðst um nýggja fiskiveiðiavtalu í Íslandi, komu ætlandi heimaftur við flogfari í gjár*

# Tað verður stríggið hjá fiskiflotanum í ár

**Christian Julius Jacobsen, sum eigur línuskipið, Morgunstjørnuna, letur ikki illa at. Hann ásannar kortini, at fellir fiskaprísurin uppaftur meira, og fiskiskapurin verður lakari, enn hann er, samstundis sum útreiðslurnar av olju og agni vera verandi høgar, kann væntast, at tað fer at sansa at hjá øllum ísfiskaflotanum**

FISKIVINNA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*



Christian Julius Jacobsen, sum júst hevur keypt útróðrarbátin, Fagraklett úr Klaksvík, eigur eisini P/F Múlavík, sum aftur eigur línubátin, Morgunstjørnuna.

Síðan 1984, tá ið hann saman við øðrum var við til at keypa línuskipið, Tummas Nygaard, hevur hann verið aktivur í vinnuni sum skipaeigari, skipari og stýrimaður. Í dag virkar hann sum reiðari og útgerðarmaður.

Christian Julius Jacobsen hevur verið á sjónum í 38 ár.

Í 1993 keyptu hann og Rólant Poulsen Morgunstjørnuna, og seinni keyptu teir eisini garnaskipið, Vesturland.

Fyri einum ári síðan keypti Christian Julius partin hjá Rólanti, soleiðis at hann nú eigur partafelagið einsamallur.

Vesturland er seldur felagnum, Thor í Hósvík.

### Klagar ikki

Christian Julius Jacobsen letur ikki illa at gongdini, hóast úrtøkan hjá línubátunum í 2004 var munandi lakari enn í 2005.

– Nei, eg kann ikki lata illa at, soleiðis sum gongdin hjá okkum hevur verið, sigur hann.

Morgunstjørnan var millum stinnastu línuskipini í fjør við einum manningarparti upp á tilsamans 386.000 krónur.

Christian Julius sigur, at skipið fiskaði fyri stívliga 19 miljónir í 2003 og 14,3 miljónir í 2004.

– Sostatt var bruttosølan út við 5 miljónir lakari í fjør enn í fyrraári.

Hann vísir á, at Morgunstjørnan stendur ikki í so nógvum peningi, og tí hevur hann ikki ringar vónir um, at tað framhaldandi fer at bera til at dríva skipið við hampiligum úrsliti.

– Men samstundis, sum fiskiskapurin er vorðin munandi lakari, og prísirnir hava verið fallandi, eru útreiðslurnar til agn og olju nógv øktar.

Christian Julius væntar, at tað verður tungt at fáa endarnar at røkka hjá teimum línubátum, sum seinastuni árini hava gjørt stórar íløgur og tískil standa í lutfalsliga nógvum peningi.

– Eg beri ótta fyri, at soleiðis, sum gongdin hevur verið í fjør, hevur helvtin av línuflotanum lítið og einki yvirskot havt.

Í hesum sambandi vísir hann á, at bruttusølan hjá línuflotanum minkaði við 26% í fjør í mun til árið fyri – og tað er ikki smávegis.

– Hinvegin hevur línuflotin havt nøkur góð ár, leggur hann dent á.

### Torført at spáa

Spurdur, hvussu hann væntar, at hetta árið kemur at roynast hjá línuflotanum, sigur hann:

– Tað er ógjørligt at spáa um hetta árið, tí alt veldst um fiskiskap og fiskaprísir.

Hann heldur, at línuflotin eins og ísfiskavinnan sum heild í løtuni er á einum vegamóti, har ógvuliga torført er at spáa um, hvønn veg tað fer.

– Minkar fiskiskapurin, og fiskaprísirnir ikki koma uppaftur, samstundis sum útreiðslurnar vera verandi høgar, er vandi fyri, at tað kemur at standa á hjá øllum ísfiskaflotanum, sigur Christian Julius Jacobsen.

# Christian Julius hevur keypt Fagraklett

**– Vit fara at rógva út við bátinum. Tríggir mans verða umborð og ein í landi, sigur eigarin, sum hevur givið bátinum navnið, Oddny**

KEYP OG SØLA
*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*




*Útróðrarbáturin, Fagriklettur, sum Spf. West í Klaksvík hevur átt, er nú heimahoyrandi á Eiði og hevur broytt navn til Oddny. Nýggjur eigari er Spf. CJJ, sum Christian Julius Jacobsen eigur*

*Mynd: Skipalistin*

Millum jól og nýggjar keypti smápartafelagið CJJ á Eiði, sum Christian Julius Jacobsen eigur, 32 tons stóra útróðrarbátin, Fagraklett, frá smápartafelagnum West í Klaksvík.

Umframt línubátin, Morgunstjørnuna, hevði Christian Julius 38 fót stóra glastrevjabátin, Oddny, sum er íslendskur bátur av slagnum, Gáski.

Samstundis, sum Christian Julius hevur keypt Fagraklett, hevur hann selt smápartafelagnum í Klaksvík glastrevjabátin.

Fagriklettur kallast nú Oddny.

### Fýra mans

Christian Julius Jacobsen sigur, at Fagriklettur fer at rógva út við línu, og egnt verður í landi. Fýra mans verða burtur av knýttir at bátinum, tríggir umborð og ein í landi.

– Fagriklettur er klárur til útróður. Vit fara bert at gera okkurt smávegis umborð, áðrenn loyst verður – helst einaferð í komandi viku, um veðrið verður betur.

Eigarin sigur, at fyrimunirnir við Fagrakletti fram um glastrevjabátin eru, at hesin er størri, og somuleiðis hevur báturin sínar egnu fiskidagar, sum fylgja við í keypinum. Haraftrat ber nú til at keypa fiskidagar.

– Snellur fylgja eisini við, men eg vænti, at tað verður línan, sum verður álitið hjá okkum, sigur Christian Julius Jacobsen.

### Bygdur í 1947

Fagriklettur er bygdur úr eik í Korsør í Danmark í 1947. Hann er 15,41 metrar langur, 4,83 metrar breiður og er merktur til 32,2 tons. Maskinan, sum er frá 1988, er ein Grenaa Diesel 121 kW/165 hk.